## Leirvíkingar bjóða til møtir

Á hvítusunnu skipar missiónshúsið í Leirvík fyri fleiri møtum.

Møtini byrja í annaðkvøld kl. 20, har Pól Johannesen úr Klaksvík talar. Við hetta møtið luttekur somuleiðis ein dramabólkur.

Hvítusunnudag er møti kl. 18. Hetta møtið er skipað sum eitt sang og vitnimøti, har Tórhild, Inga, Poul og Jóhan Edvard fara at syngja.

Seinasta møtið í hesum umfarinum verður 2. hvítusunnukvøld, har Marius Jacobsen talar og Húsakórið syngur. Við hetta møtið verður savnað inn til húsið.



# Møti og frítíð í einum

### Seinastu trý árini hevur verið skipað fyri sonevndum »Føroyskum Ársdegi«. Í ár verður eitt líknandi tiltak hildið í Hirtshals



*Hirtshals verður karmur um føroysk møtir á hvítusunnu*

**Indremission:** - Í ár verður ikki skipað fyri slíkum ársdegi. Men vit vóna kortini, at áhugi er at koma til møtini um hvítusunnuna, sigur ein av stigtakarunum, Heri Elttør.

Hann arbeiðir sum trúboðari hjá donsku Heimamissiónini, og hevur millum annað sum sítt arbeiði at virka millum føroyingar.

Eitt av tiltøkunum hava verið hesi ársdagarnir, sum hava verið hildnir bæði í Randers og í Århus. Hesaferð verður eitt møtitiltak hildið í missiónshúsinum í Hirtshals.

Á hesi stevnuni verða føroyskir talarar og føroyskar sangkreftir.

Møtini byrjaði í kvøld og halda fram til hvítusunnudag.

### Tvey fyri eitt

Tað eru kortini ikki bert møti á skránni hetta vikuskiftið í Hirtshals, har høvuðsevnið er "Andans gerningur".

Møtini byrja í kvøld kl. 19:30 við eini konsert, har Magni Christiansen og fleiri fara at luttaka.

Leygarmorgunin kl. 10 verður byrjað við kaffi og rundstykkjum og síðani verður ein bíbliutími við Vagn Foldbo, ið er aðalskrivari í føroysku Heimamissiónini.

Seinnapartin kl. 15 fer Torleif Johannesen at tosa um evnið "Eg, leiddur av Andanum? Her verður eisini ein kaffimunnur at fáa.

Um kvøldið verður aftur møti við Vagn Foldbo. Við hetta tiltakið, ið byrjar kl. 19:30 fer Magni Christiansen aftur at syngja. Síðani verður eftirmøti.

Møtini í Hirtshals enda hvítusunnudag kl. 18, har Vagn Foldbo talar og Magni Christiansen syngur.

Heri Elttør sigur, at í Norðurjyllandi eru góðir møguleikar at leiga summarhús ella campingvogn.

- Á henda hátt kann ein fáa tvey fyri eitt – at njóta hesar frídagarnar, samstundis sum møguleiki er at hoyra Guds orð, gjøgnum talu og sang, sigur hann.

Møtini verða hildin í missiónshúsinum í Hirtshals, sum liggur í Vestergade 13.

# Stevna fyri alla familjuna

### Samkoman hjá hvítusunnurørsluni í Vágum ætlar ikki at lata hesa stóru kristnu høgtíðina fara aftur við borðinum uttan markering

**Miðvágur:** Lagt er upp til eina víttfevnda skrá í bygdarskúlanum og bygdarhúsinum í bygdini hetta vikuskiftið.

Stevnan byrjar í kvøld kl. 20 við Housewarming og kl. 22 er eitt serstakt ungdómstiltak á skránni.

Hetta tiltakið er skipað sum eitt hugnaligt café-kvøld við livandi tónleiki og har møtifólkið fær møguleika at hitta tveir innbodnar gestir. Restin av kvøldinum verður skipað sum ein lovsongskonsert.

Leygardagin kl. 14 verður eitt familjutiltak á skránni, her børnini og tey vaksnu fara á eina spennandi ferð, har mangt og hvat er á skránni. Aftaná verður farið við bussi til eitt Hoppiland, sum liggur nakað burturi frá skúlanum.

### Barnamøtir

Leygarkvøldið verður aftur møti kl. 20, har Pauli Høj talar, samstundis sum onnur úr samkomuni Kelduni hava møti fyri børnunum.

Hvítusunnudag er møti kl. 11 við Tummasi Jacobsen og aftur kl. 18, har Einar Joensen talar. Við hetta seinna møti er aftur barnamøti, sum Evangeliihúsið í Havn og Betania úr Skopun skipa fyri. Dagurin endar við einum sangtiltaki kl. 21.

2. hvítusunnudag verður eisini nógv á skránni. Byrjað verður við møti kl. 11, har Dánjal á Dul talar og møti kl. 18, har Linda Petersen talar. Við hetta møtið hava fólk úr samkomunum Filadelfia og Saron barnamøtið.

Við øllum hesum tiltøkunum vóna og ynskja fyrireikararnir at hava eitt tiltak, sum vendir sær til alla familjuna.